# At blokkurin er skerdur fær onga ávirkan á fíggjarlógina

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur ikki undir við hugskotinum um at selja húsalánsgrunnin fyri at kunna brúka meiri pening til útbyggingar**

FÍGGJARLÓGIN 2003
*Áki Bertholdsen*



*Orsøkin til, at vit ikki brúka meir, er tí, at tað er ikki ráðiligt at brúka meir. Tað er ikki tí, at vit ikki hava peningin til tað, sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*

– Tað fær onga ávirkan á fíggjarlógina fyri komandi ár, at ríkisveitingin úr Danmark er skerd yvir 366 millión ir krónur um árið.

Tað sigur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Hann sigur, at hendan samgongan hevur sett sær fyri at fáa ríkisveitingina heilt burtur.

– Vit eru fegin um, at tað hevur eydnast okkum at skerja blokkin 366 milliónir. Og so er tann upphæddin minni í búskapinum og tað eiga vit at vera greið yvir og at leggja búskaparliga politikkin eftir tí.

Hann sigur, at tað er ikki peningatrot, sum avmarkar útreiðslurnar á fíggjarlógini og tað er sostatt heldur ikki blokkniðurskurðurin, sum ávirkar fíggjarlógini

– Tað er fyri so vítt ikki peningur, okkum tørvar. Var tað bara ein spurningur um pening, hevði tað borið til at brúkt meiri pening enn ætlanin er at brúka næsta ár eftir uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003, sum verður løgd fyri tingið um slakar tvær vikur.

– Orsøkin til, at vit ikki brúka meiri pening, enn vit gera, er, at tað er ikki ráðiligt at brúka meiri, soleiðis sum búskapurin er í løtuni, blokkur ella ikki blokkur, og í so máta merkist niðurskurðurin ikki. Tí brúka vit ov nógvan pening, kann ov nógv ferð koma á búskapin og avleiðingarnar av tí kenna vit væl frá kreppuni fyri nøkrum árum síðani.

Karsten Hansen sigur, at sostatt verður eisini roknað við einum yvirskoti á fíggjarlógini fyri næsta ár.

Annars er tað ógvuliga avmarkað, hvat fæst at vita frá honum um fíggjarlógina.

Men hann váttar, at lagt verður upp fyri, at búskaparligi vøksturin ikki longur er so stórur, sum hann hevur verið, tí vit vita, at tíðirnar blíva ikki við at vera so góðar, sum tær hava verið

Samstundis váttar hann, at tað, sum verður sett av til útbygginginar, er heldur minni enn í ár, tó at endaliga upphæddin ikki er endaliga ásett.

Men tað er á einum rímiligum støði, leggur hann afturat.

Í ár er upphæddin, sum er sett av til almennar útbyggingar umleið 280 milliónir.

### Vísa hvønn sín veg

Av somu orsøk er Karsten Hansen ikki serliga hugaður at selja Húsalánsgrunnin við tí endamáli at fáa meiri pening at byggja samfelagið út fyri.

Seinstu dagarnar er annars eitt uppskot umrøtt um at selja Húsalánsgrunnin og at brúka peningin til at gjalda skuld hjá landinum við. Tað fer at spara rentuútreiðslur, sum so kunnu brúkast at byggja út fyri.

– At gjalda skuld og at byggja út eru tvey mál, sum vísa hvønn sín veg. At gjalda skuld er gott, tí taå sparir okkum rentuútreiðslur og tað ger okkum sjálvsagt betri fyri.

– Men hinvegin er ikki peningatrot í landinum, so tað er ikki neyðugt at selja nakað sum helst fyri at byggja meiri út. Er ætlanin at byggja meiri út, er bara at gera tað. Men orsøkin til, at vit halda aftur, er ikki peningatrot, men tí at tað er ikki ráðiligt at brúka meiri pening fyri ikki at seta enn meiri ferð á búskapin.

– Annars er málið um at selja Húsalánsgrunnin ikki viðgjørt í samgonguni og tað kunnu verða ymsar meiningar um tað, sigur Karsten Hansen.

– Eitt hugskot, sum hevur verið frammi, hevur verið at umskipa grunnin, so at hann í minni mun skal vera við í vanligari sethúsafígging, men at hann afturfyri í størri mun skal hjálpa til at fíggja serligar byggingar og tað er alt spurningar, sum eiga at viðgerast.

# Fara at hyggja eftir skipi at avloysa Smyril

**Helst verður tað estlendska ferjan St. Ola, sum fer at avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk í vetur**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*



*Hetta verður helst ferjan, sum skal avloysa Smyril, tá ið hann fer í dokk í vetur. Strandferðslan ætlar at fáa Dúgvuna til eftirlit í sama viðfangi, so tey sleppa undan at leiga fleiri avloysaraskip*

Strandferðslan hevur nú funnið eitt skip, sum tey halda er væl hóskandi at leiga til at loysa Smyril av, tá ið hann fer í dokk í vetur. Talan er um ferjuna St. Ola, sum eitt reiðarí í Estlandi júst hevur keypt frá P & O í Skotlandi.

Reidar Nónfjall sigur, at Strandferðslan hevur havt fleiri skip í kikarunum, men teir eru nú fyribils komnir til tað niðurstøðu, at hetta skipið lýkur tær treytir, sum Strandferðslan setir til ferð, sjódygd, kapasitet og annað.

Í næstu viku fara umboð fyri Strandferðsluna at kanna skipið nærri, áðrenn endalig avgerð verður tikin. St. Ola er bygt í 1971 og Reidar Nónfjall sigur, at hon er á áleið sama støði, sum Smyril er.

Hon siglur 16 míl, hon tekur 120 bilar og 500 fólk, hon er góðar 86 metrar long og góðar 16 metrar breið, so munurin ímillum hana og Smyril er ikki stórur.

Og so hevur hon eisini stabilisatorar, men hon hevur ongar koyggjur.

Hon hevur verið skrásett í Aberdeen og hevur siglt ímillum Screabster og Stromness á Orknoyggjum. Reidar Nónfjall sigur, at verður ferjan góðkend, verður farið at vita, um tað ber til at fáa semju við reiðaríið um ferjuna.

– Í stórum eru samd við reiðaran um prísin, men smálutirnar fara vit ikki í holt við, fyrrenn vit hava góðkent ferjuna og vita nágreiniliga, at hetta er ferjan, vit vilja hava.

Tað, sum liggur í kortunum, er, at Smyril skal í dokk eftir nýggjár og eitt, sum greiða má fáast á, er, um tað ber til at fáa ætlanirnar hjá Strandferðsluni at ganga upp við ætlanirnar hjá reiðarunum við ferjuni, tí hann hevur eisini aðrar møguleikar at leiga hana.

Stjórin á Strandferslan sigur, at miðjað verður eftir at leiga ferjuna í einar 10-11 vikur.

Arbeiðið at umvæla Smyril tekur fýra- fimm vikur. Men ætlanin er at gera annað dokkarbeiði í sama viðfangi, nú hann stendur uppi kortini, so væntandi fer Smyril at verða í dokk í einar átta vikur.

– Men Dúgvan skal eisini til eftirlit og vit lúra upp á at fáa tvey fyri eitt og at leiga St. Ola so leingi, at vit eisini hava eitt avloysaraskip í tær tvær, tríggjar vikurnar tað tekur at gera arbeiði á Dúgvuna, so at vit sleppa undan at leiga fleiri ferjir.







# Mynt- & Telefonkortsamlara Stevnan 2002

Norðurlandahúsið
21.-22. september

AUKTIÓN VIRÐISMETAN FYRILESTRAR




*Eitt serligt 10 kr. telefonkort er framleitt til Mynt- & Telefonkortsamlara Stevnuna 2002, og verður eitt eintak útflýggjað ókeypis saman við teimum fyrstu 750 seldu atgongumerkjunum*

**ATGONGUMERKI kr 20**



**Drigið verður um eina Nokia 3410 ímillum seldu atgongumerkini**

## Skrá

**Leygardagin 21. september kl. 10-18**

*11.00-11.10*
Formaður í Mentanarnevnd Føroya Løgtings, Annita á Fríðriksmørk, setir Mynt- & Telefonkortsamlara Stevnuna 2002

*10.00-17.00*
Møguleiki at fáa virðismett sína savning av telefonkortum, myntum og pengaseðlum. Ole Sembach frá Sembach´s, København og Jan T. Sørensen frá Filatelistisk & Numismatisk Forlag, København, virðismeta

*11.30-12.00*
Auktión av telefonkortum, myntum og pengaseðlum. Hilmar Jan Hansen er auktionarius

*14.15-14.45*
”Pengar – hvat er tað?” við Valdimar Tómasson

*18.00*
Stevnan heldur áfram sunnudagin kl. 14.00-17.30

**Sunnudagin 22. september kl. 14-17.30**

*14.00-17.00*
Møguleiki at fáa virðismett sína savning av telefonkortum, myntum og pengaseðlum. Ole Sembach frá Sembach´s, København, og Jan T. Sørensen frá Filatelistisk & Numismatisk Forlag, København, virðismeta

*16.15-16.45*
5 søgur um pengar – m.a. um ta følsku donsku 2-krónina og myntirnar frá Trankebar – Valdimar Tómasson greiður frá

*17.00-17.10*
Lutakast um eina Nokia 3410 ímillum seldu atgongumerkini

*17.30*
Stevnan endar

www.tele.fo/cards
FØROYA TELE